# Randi aftur í Klaksvík



Málverjin á kvinnulandsliðnum, Randi Wardum, sum í fjør spældi fyri íslendska felagið Val, er nú komin heimaftur til Føroya at spæla fótbólt. Randi Wardum, sum er úr Havn, spældi við KÍ, áðrenn hon flutti til Íslands at spæla, og hon er nú farin undir venjingina í KÍ aftur. Randi Wardum hevur seinnu árini verið fremsti málmaðurin hjá kvinnum, og hon eigur eisini mestsum fast pláss sum landsliðsmálverji.

# Balling ger um seg

Fyrrverandi NSÍ-álopsspælarin, Ulrik Balling, var í sonnum málhýri, tá danska 1. deild byrjaði aftur um vikuskiftið. Balling spælir fyri Næstved, og liðið vitjaði í gjár Kolding, har tað eydnaðist at fáa javnleik, 2-2. Ulrik Balling legði Næstved á odda, men síðani skoraði Kolding tvey mál. Ulrik Balling svaraði tó aftur og tryggjaði Næstved javnleikin og eitt stig.



*Adina Petrea hevur uppvísning í skotteknikki í Runavík í gjár, tá hon skjeyt heili 19 mál í dystinum hjá Tjaldri ímóti Stjørnuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tjaldur-Stjørnan 35-29 (17-16)

# Adina og stjørnuskotini

**Tað er sjáldsom hending, at ein spælari skorar 19 mál í einum Sunset-dysti, men Adina Petrea hjá Tjaldri gjørdi tað enntá ímóti Stjørnuni! Og tá VB og Neistin spældu javnt, varð somuleiðis greitt, at Tjaldur møtir júst Stjørnuni í FM-finalunum**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað eru longu nakrar vikur síðani, at tey í Stjørnuni fingu vissu fyri, at liðið aftur í ár skal spæla í FM-finalunum. Og eftir dystin í gjár ímóti Tjaldri er tað eisini matematiskt greitt, at Stjørnan fær heimadyst í einum møguliga triðja finaludysti, umfram at liðið kann velja, um tær báðar fyrstu finalurnar skulu byrja við einum heima- ella útidysti.

Undan dystinum vistu tey í Tjaldri av, at um Tjaldur vann á Stjørnuni, var bara ein møguleiki fyri, at tað var nóg mikið til at tryggja sær finaluplássið í næstsíðsta umfarinum, og tað var, um VB og Neistin spældu javnt í Vági. Og javnleikur gjørdist tað í Vági, so tí var finalusessurin tryggjaður.

Men eftir dystin í Runavík fór at ganga sum rótasúpan har, at Neistin hevði vunnið, og tí fingu fleiri púra óneyðugar nervar og fóru at ivast í, um alt var avgjørt ella ikki. Hetta tosið var tó skjótt manað í jørðina, tá vissa fekst fyri, at dysturin í Vági altso endaði 26-26.

## Adina í hopla

At Tjaldur sum uppflytari hevur spælt seg í aðru finaluna í ár, er einki minni enn eitt bragd, og mátin, sum tað var gjørt uppá í gjár, var sera sannførandi. Hóast síni 19 mál, vinnur Adina Petrea ongan dyst einsamøll, og hóast stórskjúttin sjálvandi stjelur myndina, var talan um eitt avrik, ið alt liðið stóð aftanfyri.

Verjuspælið hjá Tjaldri var sera gott, og tað var líka við, at Stjørnan ikki eina einastu ferð fekk mál við einum skjótálopi, tí hesum fekk Tjaldur forðað fyri. Ella, sum Stjørnuvenjarin, Henrik Gerster, turrisliga staðfesti eftir dystin: – Tað er trupult at kontra, tá Tjaldur fær mál næstan í hvørjum álopi.

Og tá so Stjørnan royndi seg í hinum endanum, var annaðhvørt verjan fyri ella ein enn eina ferð stórspælandi Guðrun í Lágabø í málinum. Her fekst sjón fyri søgn, at Tjaldur hevur fleiri streingir at spæla uppá, enn fleiri vilja vera við.

Fyri at venda aftur til Adinu, so er altso sjáldsom hending, at ein spælari skorar 19 mál í einum Sunset-dysti – og so ímóti Stjørnuni, av øllum! Men tað gjørdi hon, og stutt sagt var hennara dystur ein uppvísningur í skotteknikki av einari aðrari verð. Skotini vóru varierað og væl plaserað, so sjálvt 13 metrar úr málinum kundi hon senda bóltin í málið hjá Stjørnuni, uttan at málverjin hevði nakran kjans…

## FAKTA um dystin

**Tjaldur-Stjørnan 35-29 (17-16)**
**10 min:** 5-3
**20 min:** 11-10
**30 min:** 17-16
**40 min:** 25-20
**50 min:** 30-22
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Adina Petrea 19 (1), Annika Thomsen 7, Alina Olaru Anghel 4 (2), Elinbjørg Hammer 2, Sarah Ann B±. Thomsen 2, Jacoba Langgaard 1
**Stjørnan:** Durita Christophersen 6, Simona Petersen 6 (1), Una Olsen 5, Dianne Møller 4, Anna Kristina Samson 3, Edith Hansen 2, Bára Skaale Klakstein 2, Durita Mikkelsen 1
**Brotskøst:** Tjaldur 5, Stjørnan 2
**Útvísingar:** Tjaldur 2, Stjørnan 3
**Dómarar:** Kári Hansen & Sámal Paulason

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 19 | 14 | - | 1 | - | 4 | 520 | 418 | 102 | 29 |
| 2 Tjaldur | 19 | 12 | - | 3 | - | 4 | 529 | 444 | 85 | 27 |
| 3 VB | 19 | 12 | - | 1 | - | 6 | 540 | 455 | 85 | 25 |
| 4 Neistin | 19 | 10 | - | 4 | - | 5 | 502 | 461 | 41 | 24 |
| 5 StÍF | 19 | 3 | - | 1 | - | 15 | 465 | 576 | -111 | 7 |
| 6 Kyndil | 19 | 1 | - | 0 | - | 18 | 343 | 545 | -202 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF *) | 17 | 14 | - | 0 | - | 3 | 487 | 439 | 48 | 28 |
| 2 H71 | 18 | 12 | - | 0 | - | 6 | 487 | 411 | 76 | 24 |
| 3 Neistin *) | 17 | 11 | - | 0 | - | 6 | 499 | 460 | 39 | 22 |
| 4 StÍF | 18 | 7 | - | 2 | - | 9 | 433 | 456 | -23 | 16 |
| 5 Kyndil | 18 | 4 | - | 2 | - | 12 | 423 | 482 | -59 | 10 |
| 6 KÍF | 18 | 3 | - | 0 | - | 15 | 423 | 504 | -81 | 6 |

*) Kappingarnevndin hevur ógildað úrslitið av dystinum millum Neistan og VÍF tann 18. januar, og tí er hesin ikki roknaður við á stigatalvuni

# Heilt fantastiskt!

**– Eg haldi ikki, at tað ordiliga er gingið upp fyri okkum enn, at vit eru í finaluni. Hetta er heilt fantastiskt, sigur Elinbjørg Hammer í Tjaldri**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Ei undur í, at tey fegnast á Runavíkarleiðini, nú kvinnuliðið hjá Tjaldri hevur megnað at spælt seg í sjálva FM-finaluna, sum fer at telja tveir ella tríggjar dystir ímóti Stjørnuni, sum eisini var mótstøðuliðið í gjár.

– Málið var, at vit skuldu vera millum trý tey bestu í ár, og nú eru vit enntá í finaluni. Hetta er nakað, vit spælarar ikki hava droymt um. Men vit hava ferð eftir ferð sæð, at tað kundi fara at bera til, sigur Elinbjørg Hammer í Tjaldri.

– Eg haldi ikki, at tað ordiliga er gingið upp fyri okkum enn, at vit eru í finaluni. Eg havi ið hvussu er sjálv ilt við at trúgva tí. Hetta er heilt fantastiskt!

Tjaldur hevur fyrr í ár spælt steypafinalu ímóti Stjørnuni, sum endaði við teprum 25-23 sigri til Stjørnuna. Og nú Tjaldur hevur vunnið á Stjørnuni tvær tær síðstu ferðirnar í Sunset-kappingini, er møguleikin har:

– Vit eru blivnar betri og betri, so vit kunnu saktans eisini gera en vørr í finalunum ímóti Stjørnuni, sigur Elinbjørg Hammer.

# Tjaldur bara betri

**– Vit hava vant hart í síðstuni, men tað skal ikki vera nøkur umbering, tí Tjaldur var bara betri, sigur venjarin hjá Stjørnuni, Henrik Gerster**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Fyri Stjørnuna hevði dysturin í Runavík ikki annan týdning, enn at hann var ímóti einum av trimum møguligum mótstøðuliðum í FM-finalunum. Og hóast tað kanska er eitt sindur torført at motivera spælararnar undan einum slíkum dysti, vil Henrik Gerster ikki brúka nakrar umberingar:

– Vit hava vant hart í síðstuni, tí vit hava fyrireikað okkum til FM-finalurnar, og tí vóru genturnar kanska tyngri í beinunum, enn vanligt. Men tað skal altso ikki vera nøkur umbering fyri tapið, tí Tjaldur var bara betri, sigur venjarin hjá Stjørnuni, sum heldur enn gjarna vil enda sína tíð í felagnum við enn einum greipusigri – tí triðja á rað.

– Hetta hevur verið eitt hart kappingarár, har neyðugt hevur verið at toppað fleiri ferðir, og nú vóna vit so bara, at vit aftur eru á toppinum, tá finalurnar ímóti Tjaldri skulu spælast, sigur Henrik Gerster.